Býráðið latið heiðursløn

Viðurkenning fyri mentanarligt virksemi

Mikukvøldið vóru virðisløn M. A. Jacobsens og Barnabókheiðursløn Tórshavnar Býráðs latnar



Jóhannus á Rógvu Joensen fekk barnabókaheiðursløninа fyri sítt barnatónasmíð. Á samkomuni sang dóttur hansara, Margreta, ein sang úr nýggjasta bandinum hjá páparnum

Jens Pauli Heinesen, Oskar Hermannsson og Malan Marnersdóttur fingu mikukvøldið handaðar M. A. Jacobsens virðisløninа. Barnabókaheiðursløn Tórshavnar Býráðs fingu Jóhannus á Rógvu Joensen og Dansifelagið í Havn.

Jens Pauli Heinesen fekk M. A. Jacobsens virðisløninа fyri fagrar bókmentir fyri skaldsøguna Bláfelli. Í grundgevingini viðmerkir nevndin fyri virðisløninа, at Bláfelli er seinasti partur av størsta skaldsøguverki skrivað á føroyskum: Á ferð inn í eina óendaliga søgu.

Bókin er samtíðarsøga, har skaldið Jens Pauli Heinesen rekir trædrir og lítur inn í samtíð sína. Djúphugsin og viðfarin lýsir høvundurin fólk í Føroyum í síni tíð - viðurskiftir og fortreytir, tankar og gerðir - bæði sum bygdarfólk á útskerum og sum europearar í størri høpi.

Oskar Hermannsson fekk sína virðisløn fyri fjøltáttað bókligt og mentanarligt virki.

Nevndin fyri M. A. Jacobsens virðisløninа viðmerkir, at sum ritstjóri á FØLV, sum týðari, yrkjari, søguskald og kveikjari, í leiklistini ikki minst, og sum upplesari hevur Oskar Hermannsson sett sín dám á føroyskt mentanarlív í meira enn helmingin av okkara øld. Øll kenna Oskar, er nevndin samd um.

Malan Marnersdóttur fekk virðisløninа fyri yrkisbókmentir fyri bøkurnar Fyri fyrst og Bylgjurnar leika í trá.

Malan fekk hesar viðmerkingar frá virðisløninarnevndini: Malan Marnersdóttur hevur við hesum bókum latið úr hondum úrslit av týðandi vísinda-

Framhald á síðu 7

Her handar Lisbeth L. Petersen, býráðsformaður, umboðunum fyri Havnar Dansifelag, Sonju Danielsen og Tórhild Justinussen, heiðursløninа

Myndir: Kalmar

Malan Marnersdóttur fekk M. A. Jacobsens virðisløninа fyri yrkisbókmentir

Oskar Hermannsson fekk M. A. Jacobsens virðisløninа fyri fjøltáttað bókligt og mentanarligt virki

Jens Pauli Heinesen fekk M. A. Jacobsens virðisløninа fyri størsta skaldsøguverki, skrivað er á føroyskum